# djúpum vatni



*- Tá tú fyrst hevur fingið altjóðagerðina undir húðina, er torført at halda seg burtur. Harumframt havi eg frá ungum árum viljað búð í útlandinum, og her í London havi eg tað sum blomman í egginum. Eg plagi í skemti at siga, at tað er sjórænarablóðið úr Hvalba, ið er orsøkin til tann brennandi útlongsulin, sigur Jan Ziskasen*

## Fakta

**Navn:** Jan Ziskasen
**Føddur:** 31. oktober 1967 í Klaksvík.
**Hjúnastøða:** Giftur Situ Rajani í 1992.
**Børn:** Erla (11 ár), Rósa (3 ár) og Matthias (1 ár)
**Útbúgving:** Cand.merc.dat. frá Handilsháskúlanum í Keypmannahavn

eyðkenni hesin persónurin nú enn hevur.

London er eisini tann mest altjóðagjørdi býurin í heiminum, og umleið fýrati prosent av íbúgvunum í London eru føddir uttan fyri Bretland.

## Óvissa sum drívmegi

Men hvat hevur ført ein at síggja til heilt vanligan klaksvíking til eitt leiðarastarv í eini multinationalari fyritøku? Hetta er tann fyrsti spurningurin, sum reisir seg, tá vit trína inn í modernaða skrivstovulandslagið hjá Kraft Foods í London.

- Eg havi tann eginleika, at eg altíð leiti eftir nýggjum avbjóðingum, og mær dámar best at virka í einum umhvørvi, sum ikki er konstant, men allatíðina flytur seg, broytist og umskapast. Hetta setir stór krøv til tíni evni at umstilla teg til nýggjar støður, sum tú ikki hevur møguleika at fyrireika teg til, sigur Jan, tá hann verður biðin um at greiða frá drívmegini handan yrkisleið sína.

- Eg havi so ofta sagt við meg sjálvan, tá eg havi fingið eina nýggja avbjóðing, at "hetta verður sera torført ella nærum ógjørligt". Tó havi eg altíð eitt brennandi ynski um at fara í holt við uppgávuna. Eg arbeiði í løtuni við einari verkætlan í Norðuramerika uppá 5 milliardir krónir, og tað er púra ørt og óveruligt, tá eg hugsi nærri um tað.

KT-stjórin greiðir víðari frá, at hann mangan fær uppgávur latnar uppí hendi, ið við fyrsta eygnabrá kunnu tykjast fullkomiliga ómøguligar at loysa, men tá ræður um at hava tunguna mitt í munninum, varðveita yvirlitið og hava álit á sær sjálvum eins væl og á arbeiðsfeløgunum.

- Eg trívist best á djúpum vatni, har eg havi kensluna av, at eg ikki grynni. Lyklaorðið í øllum trongstøðum er ikki at vera uppgevandi og at hava eginleikan at síggja møguleikarnar í eini annars vónleysari støðu. Tað ræður um at handfara váða og óvissu á ein skynsaman hátt og at taka skjótar og greiðar avgerðir, hóast nógvir ókendir faktorar gera seg galdandi, greiðir Jan hugleiðandi frá.

Eftir at hava staðið á odda fyri eini verkætlan seinastu mongu árini, hvørs endamál var at implementera SAP-teldu-skipanina í Evropa liggur kósin nú til Chicago har Jan og hansara toymi skulu leiða eina líknandi verkætlan fyri alt Norðuramerika.

- Hetta er mín størsta avbjóðing nakrantíð, tí Kraft Foods í USA er nærum fimm ferðir størri í vavi, hvat sølu og framleiðslu viðvíkur, samanborið við Evropa, sigur Jan. Hetta er eisini orsøkin til, at Jan nú flytur við familjuni til Chicago.

## Nýmótans leiðsluháttur

Fyritøkan í USA hevur nýtt eini 800 ymsar telduskipanir til framleiðslu, innkeyp, lagur, sølu og fíggjarstýring. Hesar skulu nú niðurleggjast og avloysast av bert einari SAP-skipan.

At vera leiðari fyri slíkum risastórum milliarda-verkætlanum setir stór krøv til samskipanina av tí dagliga arbeiðnum og samskifti millum leiðara og starvsfólk. Jan hevur eisini sínar greiðu áskoðanir um, hvussu ein stjóri røkkur sínum málum.

- Mín fremsta uppgáva er at byggja upp eitt lið, sum er ført fyri at loysa tær uppgávur, ið eru settar út í kortið. Eg skal tryggja, at organisatoriski bygnaðurin samsvarar við tær avbjóðingar, ið liggja fyri framman. Miðaldarliga hugsanin um, at starvsfólkið skal tæna leiðsluni er ikki serliga produktiv, og tí leggja vit stóran dent á, at hvørt einstakt starvsfólk skal kenna, at tey eru partur av nøkrum virðismiklum, og at tey eru ein týdningarmikil liður í heildini, sigur Jan um sín leiðsluhátt.

- Vit royna at skapa eina vælvirkandi eind, har eingin einstakur liður ber øllum uppi. Hetta ger eindina sterkari, so at hon tolir teir brotasjógvar, ið alla tíðina skola omanyvir okkum. Eg nýti soleiðis nógva tíð saman við starvsfólkunum og royni at motivera hvønn einstakan, har eg síggi møguleikar fyri framgongd og menning.

## Sjórænarin fekk útlongsul

Meðan Jan gekk á handilsháskúlanum